NØVN

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma og omma

Solo Gloria (Sola) Absalonsen
fødd Henriksen

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri vitjanir, kransar og blómur.
Takk til Pól Johannessen trúboðara og Mariu Jørðdal Niclasen prest fyri góð og troystarrík orð.
Takk til gravarar, sangarar og spælarar.
Takk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum og øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Vegna tey avvarðandi
Óli Kári, Marita, Jórun, Jákup, Gunhild og Annubeth.

Tøkk

Hjartaliga takk tit øll,ið sýndu hjálpsemi,tá kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

Olivia Petersen
Skopun

andaðist og varð jarðað.Tøkk til Henning Bøgesvang,prest og tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við ervinum. Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Gerðisgarði og á Skerðinum,ið fjálgaðu so væl um Oliviu øll tey mongu ár,hon var á hesum heimum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur.
Tøkk tit mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Sólvá, Kristian Arnfinn, Tórstein, John og Sunneva

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

Alfred Kristian Magnussen
Vági

Andaðist og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til heimarøktina og heimasjúkrasystrarnar, og ein tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar sjúkrahúsi. Og takk til prest fyri góð og troystarrík orð. Takk til kirkjutænarar, gravarar og sangarar. Eisini takk til tykkum øll, sum á einhvønn hátt hjálptu til og sýndu samkenslu í samband við jarðarferðina og ervið.
Hjartaliga tøkk til tykkum, sum sendu pening til missiónshúsið í Vági.

Vegna familjuna
Synirnir

TILTØK

Gudstænastur 1. september
Havnar kirkja kl.11.00, Sonja Klein
Hoyvíkar kirkja kl.11.00, Uni Næs Eiði: kl. 12 messa Emil Olsen. Broytt kirkjutíð: Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju á Eiði og við Gjógv kl. 12.
Christianskirkjan kl.11.00 Maria J Niclasen
Viðareiði kl.11.00 Marjun Lómaklett
Árnafjørður kl.11.00 Hanus á Gørðum útvarpað
Vesturkirkjan kl. 11.00: Bergur Debes Joensen. Sunnudagsskúli er undir prædikuni. Kirkjukaffi er eftir gudstænastuna.
Argja kirkja kl. 11.00: Heri J. Joensen. Sunnudagsskúli er undir prædikuni.
Kirkjubøar kirkja kl. 11.00: Derhard Jógvansson. Altargongd.
Haldórsvík kl. 11, Bergtórur H. Bjarkhamar, altargongd
Sjóvar kirkja kl. 11 v/Símun Persson Jacobsen - altargongd

Vitjunarvinir
Um tú vil verði vitjunarfolk hjá Reyða Kross Føroya, ring ella skriva:
Reyði Krossur Føroya,
Bryggjubakki 10,100 Tórshavn tlf. 319630
Fyriskipari: eyrith@redcross.fo tlf. 513784
marin@redcross.fo - tlf. 284333

Sorgbólkur fyri vaksin
Sorgbólkur fyri vaksin, ið hava mist ein av sínum kæru. Bólkaleiðarir er Margret Mortensen og Sigrun Heldarskað, ið báar eru psykoterapeutar og sjúkrarøktar frøðingar. Ringið og frættið meira: Margret 223456 og Sigrun 265432

Frá Christianskirkjuni
Konfirmatnar, ið skulu fermast í heyst í Norðoya vestara prestagjaldi møta í Christianskirkjuni mánakvøldið 26 aug. kl.19.00 saman við foreldrum, havi dóps ella navnabræv við. Prestur

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Mikudagin 28. aug.
Kl. 19:30 Bíbliutími
Fríggjadag 30. aug.
Kl. 21:00 Ungdómsmøti Hvat sigur bíblian um lovsang v/ Hallur av kák Joensen
Sunnudag 1. sep.
Kl. 17:00 Felagsmøti v/ Hildur Davidsen. Kvinnur syngja
www.glyvra.fo

Frá Missiónshúsinum við Landavegin
Mikukvøldi møti kl. 20.00
Sunnukvøldi møti kl. 18.00 v/ Hera Joensen

KFUM & K Klaksvík
Mikudag kl.20.00 Bíbliutími við Petur Martin Glerfoss
Leygardag kl.20.00 Ungdómsmøti
Sunnudag kl.14.00 sunnudagsskúli
kl.17.30 Bønarmøti
kl.18.00 Sang og vitniløta
Øll hjartaliga vælkomin

Missiónshúsið í Skopun
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta.
Kl. 20 bíbliutími.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli.
Kl. 18 møti.

Lívains Orð, Runavík
Fundarskrá
Týskvøldi kl.20,00 Bønarbólkur hjá Martin S.Joensen,Rituvík
Mikukvøldi kl.20.30 Ungdómsmøti
Sunnumorgun kl.10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

Missiónshúsið í Rituvík
Mikudag.
Mikukvøldsmøti kl. 20:00
Hósdag juinorringur kl. 19:00 Leygardag
Ungdómsmøti kl. 20:00
Sunnudag
kl. 16:00 familjumøti

Evangeliihúsið
Mánakvøld kl 20 Lovsangs- og bønarløta
Mikukvøld kl 19 Mini Salt (9-12ár)
Sunnumorgun kl 10
Morgunmatur, kl 11 Familju- og morgunmøti V/sunnudagsskúla, Heðin Lamhauge tosar

Meinigheidshúsið í Havn
Mánadagin kl 21.00
Kvinnubønarmøti hvørt Mánakvøld
Týsdagin kl 20.00 Bíbliutími v/ knút Larsen Luk 1.26 - 38
Hósdagin kl 20.00 Ungdómsmøti
Sunnudagin kl 14.00 Sunnudagsskúli
Sunnudagur kl 18.00 Møti v/ Gunnar Reynslág

Kiwanis Tórshavn
Notarius publicus hevur trekt hesi vinnaranummur.
1. seðil nr. 5728
2. seðil nr. 7202
3. seðil nr. 6406
4. seðil nr. 3943
5. seðil nr. 8473
Vinnararnir ringja til 556443 314109 214414
Takk fyri stuðulin
Kiwanis Tórshavn

Dagtilhaldið í Nólsoy
er opið mánadag týsdag og hósdag frá kl. 13 til 17, hósmorgun er gongutúrur kl 10.30

Kollafjørður
Nýtt skeið við Vøgguljóð byrjar aftur 27. sept.
Meir fæst at vita og tilmelding hjá Miriann Dam tlf. 222478 ella mijo@olivant.fo

Adventistakirkjan.
Leygardagin 31. august 2013
Temadagur er við Flemming Risager úr Danmark
Kl. 10.00 Bíbliugransking við Flemming Risager
Kl. 11.00 Gudstænasta við Flemming Risager
Døgurðasteðgur - vit bjóða súpan
Kl. 13.15 Fyrilestur Flemming Risager

KATÓLSKA KIRKJAN
Hvønn gerandisdag messa í Kerit kl. 17.30.
Leygardag verður messa í Kerit. kl. 11.30
Sunnudag hámessa kl. 11 v/Martin Chase, prestur í Mariukirkjuni.
Aftaná messuna verður ein kaffemuður.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 1. september kl. 14.
Tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum verður í Kerit frá kl. 17 til 18. Øll eru vælkomin.
Hóskvøldið 5 september kl. 20 verður fyrsta Taizé-kvøldið aftur í Kerit.
www.katolsk.fo

Missiónshúsið Tvøroyri.
Sunnudagin kl. 2 byrjar sunnudagsskúlin, onki møti vegna felagsmøti í Porkeri.
Sjómannskvinnuringurin byrjar afturtýskvøldi 3 sept.kl.19.30, allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar at vera við.

Vestmanna Missiónshús.
Sunnudagin 1. sept., kl. 18.00, verður møti við Fríðu og Jóhannes Danielsen úr Havn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Suðuroyartúrur
Ætlanin er at fara til Suðuroyar vikuskiftið 06. – 08. september.
Vit gera ein gongutúr leygardag og ein stytri túr sunnudag.
Vit búgva Undir Heygnum, har eru 18 seingjarpláss og 6 til soviposa. Kostnaður kr. 1.200,00 pr. fólk, fyri mat og gisting.
Vit fara suður við Smyrli kl. 18.30 fríggjakvøld og koma norðuraftur kl. 17.30 sunnukvøld. Ein kann tekna seg við at gjalda dipositum kr. 300,00 pr. persón á konto 9865 0001033381. Tekningarfreist 3. september 2013. Túrurin verður bert gjørdur, um nóg stór luttøka er.
Nevndin

Leynar
:Møti verður í skúlanum,leygarkvøldið kl.20.00 við Edelborg Petersen,og lutøka úr Sørvági við sangi.
Verði hjartaliga vælkomin.

LÝSINGARTORG

Akfør

Volvo XC 90 til sølu.
Um nøktandi boð fæst er ein Volvo XC90 til sølu. Bilurin er 2 ár og 8 mðr. og sera væl hildin.
Fartelefon 220976

Arbeiði

Betong Saging Tlf: 560056
Vit saga út fyri vindeygum, hurðum, ventilatiónshol, o.a. Ring og fá ein góðan prís.
560056

ARBEIÐI VERÐUR GJØRT
MÁLA,PUSSA,STOYPA, SMÍÐA, GRAVA,URTAGARÐ,FLYTIGÓÐS V.M. MAZDA PREMACY BÍLIGATIL SØLU. KONTORBORÐ OG STOLAR, REOL OG SOFABORÐ BÍLIGA TIL SØLU
224910

Timburarbeiði
Tilboð ynskist at beklaga og seta vindeygu í. Tað er ein betongbygningur, ið stendur í Tórshavn
Sp/f Búgv 213303

Málaraarbeiði
Alt uttandura málaraarbeiði verdur gjørt, so sum hús, tekju osv. 594198/503083

Býli í Føroyum

Kamar til leigu
Kamar til leigu í Eysturbyin, leigast til friðarligt fólk.
260196

Kamar til leigu
Í Vesturbýnum og nær við Vesturkirkjuna er kamar til leigu. Atgongd til køk, vask og bað. Møguleiki fyri breiðbandi.
262394

Ynskist
Familja ynskir hús ella íbúð til leigu í Tórshavn, má hava trý kømur. Vinarliga ring
361932 - 252867

Kamar til leigu
Kamar til leigu í Eysturbyin, leigast til friðarligt fólk.
260196

Kamar til leigu.
við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu, turkitrumlu, fristiboks og tráleyst internetbreiðband. Nær við Læraraskúlan og Sjómaskúlan.
221158

Sjavs

Sjavs
Sjavs verður hósdagin 29/8, kl 18,45, Eldrafelagið Nón, Saltangará

